## Vindorka bíligari

Ein frágreiðing, sum altjóða kanningarstovnurinm Emerging Energy Research hevur gjørt fyri danska vindmylluvirkið Vestas, staðfestir, at í framtíðini verður tað bíligari at útvega fólki og fyritøkum elorku við vindmegi enn við olju, gassi ella koli. Stovnurin vísir á, at Kyoto-protokollin, sum kemur í gildi næsta ár, leggur gjald á CO2-útlát, og tað fer at hava við sær, at vindorka verður bíligari orkukelda til el orkuenn olja, gass og kol.

## Eisini menn

Tey flestu munnu hugsa kvinnur í neyð, tá tosað verður um kreppumiðstøðir, men tann fyrsta royndin í Danmark vísir nú, at menn í neyð hava eisini brúk fyri einari kreppumiðstøð. Í hvussu er hava meiri enn 60 menn verið í sambandi við stovnin Mandecentret í Keypmannahavn, síðani hann byrjaði fyri stuttum, og sambært leiðsluni er talan um menn úr øllum samfelagsbólkum, sum koma í kreppu av hjúnarskilnaði o.ø.



# Vandi fyri at føroyingar fara at liggja eftiri á

**- Fáa vit útlendska arbeiðsmegi á føroysku flakavirkini, er vandi fyri, at føroyska arbeiðsmegin missur arbeiði, halda arbeiðarafeløgini. Tí mæla tey til størsta varsemi við at fáa fleiri føroyingar til Føroyar at arbeiða á flakavirkjum**

TROT Á ARBEIÐSMEGI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Áðrenn vit fáa fleiri útlendingar til Føroyar at arbeiða á flakavirkjum, skulu allir føroyingar hava nokk at gera.

Og tað hava teir ikki í løtuni.

Tað siga umboðini fyri arbeiðarafeløgini í Arbeiðsmarknaðarráðnum.

Tey eru tí ikki sinnað at lata slúsurnar upp, so at fleiri útlendingar skulu sleppa til Føroya at arbeiða á flakavirkjum.

Tey leggja dent á, at áðrenn fleiri útlendingar koma til Føroya at arbeiða á flakavirkjum, skal tann arbeiðsmegi, sum longu er í landinum, gagnnýtast til fulnar.

- Hetta verður ikki gjørt í løtuni, staðfesta umboðini hjá arbeiðarafeløgunum í arbeiðsmarknaðarráðnum.

Tey seta eisini spurnartekin við uppgerðina hjá umboðunum hjá arbeiðsgevarunum, sum vit hava aðrastaðni her á síðunum og tey ivast í um trotið á arbeiðsmegi er so stórt, sum tey siga.

Umboðini hjá arbeiðarafeløgunum í arbeiðsmarknaðarráðnum siga, at tey hava verið í sambandi við arbeiðarafeløgini kring landið og upplýsingarnir tey fáa frá teimum, samsvara ikki við tey tøl, sum arbeiðsgevarar varta upp við.

Men samstundis ásanna tey, at tað er torført hjá arbeiðarafeløgunum at fáa fatur á nágreiniligum upplýsingum um trotið á arbeiðsmegi.

### Verða við sviðusoð

Í sambandi við spurningin um útlendska arbeiðsmegi, leggja arbeiðarafeløgini eisini sera stóran dent á rættin hjá arbeiðsmegini, sum longu er í Føroyum, til at hava arbeiði.

- Tá ið eitt virki fær útlendingar at arbeiða, skulu teir tryggjast fulla arbeiðsviku, sum er 40 tímar um vikuna.

Annars fáa teir ikki arbeiðis- og uppihaldsloyvi.

- Hendan rættin hevur ongin ófaklærdur ella tímaløntur føroyingur og tískil eru arbeiðarafeløgini varin við at mæla til, at fleiri útlendingar koma til Føroyar at arbeiða.

Arbeiðarafeløgini í Arbeiðsmarknaðarráðnum stúra fyri, at koma fleiri útlendingar til Føroyar at arbeiða, verður tað arbeiðsfólkið, sum longu er í landinum, sum verður við sviðusoð.

Hesin vandin er til staðar, tí arbeiðsgevarin skal tryggja einum útlendingi 40 tíma arbeiðsviku. Og er lítið arbeiði, er sostatt vandi fyri, at tað verða útlendingarnir, sum verða tiknir framum føroyingarnar.

- Hetta er ikki óveruligt, tí longu sum er, eru tað nógv virki, sum bara hava arbeiði tveir, tríggjar dagar um vikuna.

Arbeiðarafeløgini halda, at hetta vísa tølini hjá ALS eisini, tí í november fingu 324 fiskafólk útgjald úr ALS.

Tey staðfesta eisini, at tey virki, sum hava støðugt arbeiði, hava munandi lættari við at fáa støðuga arbeiðsmegi.

Arbeiðarafeløgini skjóta tískil upp, at tey fólk, sum longu eru í fiskavirkisskipanini hjá ALS, verða gagnnýtt betri.

Í hesum sambandi mæla tey til at kanna um tað ikki ber til at gera eina smidliga skipan, har tað skal bera til hjá einum virki, sum hevur trot á arbeiðsmegi, at læna fólk frá einum øðrum virki, sum hevur ov lítlan fisk at arbeiða.

# afturat

Men sum tað sæst aðrastaðni, eru arbeiðarafeløgini alt annað enn samd í uppgerðini hjá arbeiðsgevarunum.

### Fleiri arbeiðsleys í ALS

Hinvegin má staðfestast, at hendan uppgerðin hjá arbeiðsgevarunum stendur í skerandi andsøgn til teir upplýsingarnar, ið arbeiðsloysisskipanin hevur.

Um sama mundi, sum hendan kanningin varð gjørd, vísa arbeiðsloysistølini hjá ALS; at 105 fiskafólk ganga hendur í lumma.

Tølini hjá ALS vísa, at í Suðurstreymoy eru 19 arbeiðsleys fiskafólk, í Vágum og í Norðstreymoy eru 7, í Eysturoy eru 6 í Norðoyggum eru ikki færri enn 22 arbeiðsleys fiskafólk og í Suðuroy ganga heili 46 fólk í hesi vinnuni við ongum arbeiði, sigur ALS.

# Gjørdi ikki Jacob Vestergaard klókari

**- Tey, sum skuldu geva landsstýrismanninum álítandi upplýsingar, kunnu ikki semjast**

TROT Á ARBEIÐSMEGI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Er brúk á meiri útlendskari arbeiðsmegi í Føroyum?

Tað er tað ikki semja um, so verri enn so.

Arbeiðsgevarar siga, at stórt trot er á arbeiðsmegi.

Men tað eru arbeiðarafeløgini ikki samd í

Av tí, at meiningarnar eru so ymiskar, setti Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í innlendismálum, seint í fjør eitt Arbeiðsmarknaðarráð. Har sita umboð fyri arbeiðsgevarar og arbeiðarafeløg og onnur.

Endamálið við ráðnum var at geva landsstýrismanninum tilmæli um ymisk viðurskifti, sum hava við arbeiðsmarknaðin at gera.

Ein ítøkilig uppgáva, sum ráðið fekk, var at geva landsstýrismanninum eina meting av, um tørvur er á útlendskari arbeiðsmegi í føroysku flakavinnuni og, hvussu stórur hesin tørvur er.

### Kundu ikki semja

Men hevði landsstýrismaðurin vónað at fingið eina greiða niðurstøðu, varð hann vónbrotin.

Tí tað vísti seg nevniliga, at Arbeiðsmarknaðarráðið kundi ikki semjast um eitt tilmæli.

Sum tað sæst aðrastaðni er á síðunum, siga umboðini hjá arbeiðsgevarunum, at flakavinnan hevur tørv 165 fólkum.

Men tað trúgva arbeiðarafeløgini onki upp á. Tey siga, at ein máti at nøkta tørvin á arbeiðsmegi við føroyskari arbeiðsmegi, er at hava støðugt arbeiði, góða løn og trivnað á arbeiðsplássinum.

Tí er tað ein spurningur um Jacob Vestergaard er vorðin stórt klókari tí, sum Arbeiðsmarknaðarráðið hevur avrikað á hesum øki.

Formaðurin í Arbeiðsmarknaðarráðnum, Jákup Pauli Strøm, staðfestir eisini, at sjónarmiðini eru mótstríðandi og at tað tískil er torført at seta tal á, hvussu stórur tørvurin á útlendskari arbeiðsmegi er.

Men samstundis staðfestir hann, at ein ávísur tørvur er til staðar.

Og tað er eisini hetta, sum landsstýrismaðurin arbeiðir við og í vár er ætlanin at gera eina skipan, sum ger tað smidligari og lættari at fáa útlendingar til Føroya í ávísa tíð at gera ávís arbeiði.

Tað, hann hugsar sær, er, at hevur ein arbeiðsgevari brúk fyri útlendingum til eitt ávíst arbeiði, kann hann fáa útlendingar til tað. Tá ið arbeiðið so er gjørt, fara teir so avstað aftur.